Blái Krossur
BLUE CROSS IN FAROE ISLANDS

## Søkt verður eftir kokki

**Við hesum verður søkt eftir kokki til Blákrossheimið.**

**Uppgávur/arbeiðsøki:**
- matgerð
- innkeypa av vørum
- praktiskt arbeiði

**Førleikar/eginleikar:**
- kokkaútbgving ella líknandi
- tú ert álitisvekjandi og álitandi
- tú dugir væl at arbeiða við menniskjum
- tú ert fyrikomandi og hevur samstarvsvilja
- tú hevur evni at arbeiða sjálvstøðugt
- tú vilt arbeiða samsvarandi blákrosshugsjónini

**Løn/setanartreytir:**
Talan er um fulltíðarstarv. Lønin verður ásett smb. avtalu. millum fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til Olgu Magnussen á tlf. 315575 ella olga@blakross.fo

Umsókn saman við evt. prógvum, viðmælum v.m. skal verða okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 28 sept. kl 12:00
Umsóknin skal sendast til Blákrossheimið

**Blákrossheimið**
Olga Magnussen, Leiðari
Lynggøta 12
FO-100 Tórshavn

Blái Krossur Føroya hevur smb. §2 í viðtøkum felagsins til endamáls:
- at hjálpa menniskjum, ið eru illa stødd av rúsdrekkaávum
- at fyribyrgja, at fólk misnýta rúsdrekka og onnur rúsandi evni
- at virka fyri eini rúsfríari lívsáskoðan og rúsfríum umhvørvi
- at boða gleðiboðskapin um Guðs kærleika til menniskju

Sjónleikarafelagið
Dramaverkstaðið

Børn 9 ár og upp til 14 ár. Tilmelding til drama/sjónleikarskeiðini hetta skúlaárið, fer fram á www.dramaverk.net

14 ár og vaksin óavmarkaður aldur, tilmelding fer fram hjá Tórshavnar Kvøld og Ungdómsskúla, Teirra treytir og tilmelding verður lýst í bløðunum.

Á heimasíðu okkara ber til at kunna seg um skeiðini, bæði viðvíkjandi børnum, ungum og vaksnum.

Øll eru vælkomin at spyrja seg fyri undir knøttinum "samband".

almannastovan

## Umsorgararbeiði 2010

Umsóknarfreistin fyri at søkja um fíggjarligan stuðul til umsorgararbeiði 2010 er:

**1. september 2009**

**Hesir bólkar/tiltøk hava rætt til umsorgararbeiði:**
1. Mattænastu til fólkapensjónistar.
2. Koyritænastu ella vitjunartænastu fyri pensjónistar.

**Umsóknin skal:**

1. Greitt tilskila, hvør søkir um stuðul og stendur fyri tiltakinum ella fyriskipanini.
2. Neyvt lýsa virksemið, ið stuðulin verður søktur til.
3. Neyvt útgreina upphæddina, ið søkt verður um, t.d. í lønarútreiðslur, útreiðslur til høli o.s.fr.
4. Upplýsa tal av starvsfólkum, og um hvør hevur ábyrgd av virkseminum.
5. Meta um tiltakið annars og grundgeva fyri tí ágóða, sum pensjónistar kunnu fáa av virkseminum.

Annars verður víst til kunngerð nr. 160 frá 21. desember 2005 um stuðul til umsorgararbeiði, broytt við kunngerð nr. 110 dagfest 15. desember 2008. Henda er at finna á www.logir.fo undir Almannaverk - Almannaviðurskifti annars.

**Umsókn skal sendast til:**

Almannastovan
Smyrilsvegur 20
Postrúm 3096
110 Tórshavn

**Umsóknirnar verða avgreiddar í seinasta lagi 15. desember 2009.**

ADVOKATSKRIVSTOVAN
Halgir Winther Poulsen, adv.
Fríða Patursson, adv.
Óla Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Jógvan E. Winther Poulsen, adv.
Aksel V. Johannesen, adv.
Eyðbjørn Larsen, adv. ft.

## Til sølu

Vegna Sp/f AÓ-Byggifrøði í konkurs eru hesar ognir til sølu:

- Ein bilur av merkinum Fiat Dukato, 2,2 HDI, árgang 2005, koyrt 45.863 km.
- ymisk amboð, m.a. luftkompressari, sagir, borimaskinur, skrúvumaskina, og seympistólar.
- Ymisk hondamboð, m.a. vaterpass, hamari og høggijørn.

Bjóðast kann uppá lutirnar samlað ella hvør sær.

Áhuga verða biðin um at venda sær til Advokatskrivstovuna, Frúutrøð 4, 100 Tórshavn, tlf. 35 33 35, att: Eyðbjørn Larsen, adv. ft. mail: eyl@jura.fo, ella Margit S. Jørgensen, mail: msj@jura.fo

FRÚUTRØÐ 4 · POSTBOKS 6 · FO-110 TÓRSHAVN
TEL 35 33 35 · FAX: 35 33 36 · WWW.JURA.FO

Keypssamtøkan í Miðbýnum

FK í Miðbýnum sóknast eftir

## *Handilslærlingi*



**at byrja 14. september ella eftir nærri avtalu**

**Krøv um útbúgving**
- FHS - 3 ára lærutíð
- HH - 2 ára lærutíð
- Student ella HF - 2 ár og 18 vikur

Vit bjóða einum drongi ella einari gentu, við dirvi og áræði, eina útbúgving undir skipaðum viðurskiftum, í einum handli, sum lív er í

**Arbeiðstíð:** 40 tímar um vikuna, frí annan hvønn leygardag

Nakrar ferðir í lærutíðini verður farið á skeið í Danmark

**Okkara krøv:** Tú skalt vera fyrikomandi, kundavinarlig/ur, røkin, hava góð samstarvsevni

**Løn:** Sambært S&K sáttmálanum

Aðrir upplýsingar fáast við at ringja til 311320 ella 228222 og spyrja eftir Boga Vík

**Umsókn:** Skrivlig umsókn, merkt *Lærlingur,* skal í seinasta lagi sunnudagin 6. september, saman við próvtøkuskjali sendast til

**FK í Miðbýnum**
**Att. Bogi Vík**
**Dr. Jakobsensgøtu**
**Postboks 349**
**FO-110 Tórshavn**

ella sum teldupostur til: bv@fk.fo

## TÆNARI

Vit sóknast eftir tænara til matstovuna.

**Tað krevst, at umsøkjarar:**
- eru fyrikomandi
- eru álitandi
- hava góð samstarvsevni
- eru tænastuáhugaðir

**Umsóknir skulu sendast til:**
Restaurant Zitouna
Lucas debesargøta 3
100 Tórshavn

ella við telduposti til: zitouna@flatrate.fo

Meira fæst at vita á 56 22 23

Restaurant Zitouna

Lucas deesargøta 3 · 100 Tórshavn · Tel. 602220